almannaverkið

# Umsókn um stuðul til bústaðarbroyting - Forsorgarlógin §18 e

til persónar við munandi og varandi avmarkaðum likamligum ella sálarligum førleika,
tá innrættan er neyðug fyri at gera bústaðin betur egnaðan sum tilhald fyri viðkomandi

## Upplýsingar umsøkjarans

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Navn (barnsins navn, um søkt verður til barn) | | | P-tal | |
| Bústaður | | | Fartelefon | |
| Býur | | Postnr. | Telefon | |
| Teldupostur | | | Kommunulækni | |

## Avvarandi

| | | | |
|---|---|---|---|
| Avvarandi, ið Almannaverkið kann samskifta við, um umsøkjarin ikki sjálvur kann | | | |
| Navn | | Fartelefon | |

## Søkt verður um stuðul til

| | Set x | Stutt lýsing av hvat skal gerast |
|---|---|---|
| Broyting av verandi bústaði | | |
| Tillaging av verandi atkomuviðurskiftum | | |
| At flyta bústað (heilt serligar umstøður) | | |
| Ráðgeving um bústaðarviðurskifti | | |

## Lýs praktiskar trupulleikar, sjúku ella brek , sum forðar tær í gerandisdegnum heima við hús

## Seinasta kanning / viðgerð

| | | | |
|---|---|---|---|
| Nær | | Hvar | |
| Læknaváttan | Um neyðugt er við læknaváttan, skal læknin brúka váttan LÆ 175 FO | | |

## Aðrir upplýsingar

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Hevur heimasjúkrarøkt / heimahjálp | Navn | | Fartelefon | |
| Um annar persónur enn umsøkjarin hevur útfylt umsóknarblaði | Navn | | Fartelefon | |

## Váttan

Undirritaði/a váttar við hesum, at upplýsingarnar í hesum umsóknarblaði eru rættar og at eg loyvi Almannaverkinum at savna neyðugar upplýsingar til málsviðgerðina.

| Dagfesting | Undirskrift (Umsøkjarans, avarandi ella foreldra/verja) |
|---|---|
| | |



Staravegur 18 • Postboks 3096 • FO-110 Tórshavn
Tel 360000 • Faks 360001 • av@av.fo • www.av.fo

almannaverkið

# Umsókn um stuðul til bústaðarbroyting - Forsorgarlógin §18 e

til persónar við munandi og varandi avmarkaðum likamligum ella sálarligum førleika,
tá innrættan er neyðug fyri at gera bústaðin betur egnaðan sum tilhald fyri viðkomandi

## Kunning um stuðulsmøguleikar og afturgjaldsskyldu

**Stuðulsmøguleikar**

**Verandi bústaður**
Stuðul verður veitt til innrættan av bústaði til persónar við munandi og varandi avmarkaðum likamligum ella sálarligum førleika, tá ið innrættan er neyðug fyri at gera bústaðin betur egnaðan sum tilhald fyri viðkomandi.

**Møguliga annar bústaður**
Í teimum heilt serligu førunum, har stuðul ikki er nøktandi til at gera verandi bústað egnaðan sum tilhald, kann stuðul veitast til at gjalda útreiðslurnar av at útvega ein annan bústað. Hesin stuðul kann tó bert veitast, um annar bústaður ikki kann ávísast, ið nøktar tørvin hjá viðkomandi.

**Afturgjaldsskylda í sambandi við bústaðarbroytingar**

**Egin ogn**
Almannaverkið kann veita persóni hjálp til bústaðarinnrætting av egnari ogn.

**Virðisøking** (lán fellur til gjaldingar við eigaraskifti)
Hevur innrættingin eina munandi virðisøking av bústaðnum við sær, eisini fyri onnur, verður tann parturin av hjálpini, sum samsvarar hesi virðisøking, veittur sum rentu- og avdráttarfrítt lán, ið fellur til gjaldingar við eigaraskifti.

**Annan bústað**
Almannaverkið kann veita persóni hjálp til at útvega annan bústað.

**Virðisøking** (lán fellur til gjaldingar við eigaraskifti)
Tann parturin av hjálpini, sum svarar til munin millum virðismetingina av verandi og fyrrverandi ognini, verður veittur sum rentu- og avdráttarfrítt lán, ið fellur til gjaldingar við eigaraskifti.
Almannaverkið nýtir húsameklaravirki ella Bústaðir at gera virðismetingina.

**Tinglýsing**
Fyri at tryggja lánini, verður veðbræv uppsett og tinglýst ávikavist í ognini, har bústaðarinnrættingin er framd, ella í nýggju ognini. Almannaverkið ber fyrisitingarligu útreiðslurnar av hesum.

**Møgulig niðurskriving**
Lánini kunnu niðurskrivast yvir eitt tíðarskeið upp til 20 ár, um so er, at virðisøkingin minkar í tíðarskeiðnum.

**Kæruvegleiðing**
Avgerðir, um bústaðarbroytingar, kunnu kærast til Kærunevndina í almanna- og heilsumálum innan 4 vikur frá tí degi, kærarin hevur fingið fráboðan um avgerðina.

Kærunevndin kann víkja frá freistini, um serlig orsøk er til tað.

**Lógarheimild**
Víst verður til forsorgarlógina §18e og tilhoyrandi kunngerð um afturgjaldsskyldu í sambandi við bústaðarbroytingar

**Barn**
Verður søkt vegna barn, er tað barnsins navn og p-tal, sum skal upplýsast. Aðrir kontakupplýsingar so sum telefonnumar og teldupostur skulu verða foreldranna/verjans.


Staravegur 18 • Postboks 3096 • FO-110 Tórshavn
Tel 360000 • Faks 360001 • av@av.fo • www.av.fo